# Góðanes á Flesjarnar – eitt fimmti ára minni

**Tann 2. januar 1957 sigldi íslendski trolarin Góðanes á Flesjarnar og sakk. Allir av manningini vórðu bjargaðir uttan skiparin. Í hesum sambandi verður minningarhald á Strondum sunnudagin, har ein minnissteinur verður avdúkaður. Vit fara í hesi grein at greiða frá tilburðinum**

SKIPBROT
*Óli Jacobsen*
*olij@sosialurin.fo*



*Manningin avmyndað á Sjómansheiminum. Føroyingarnir umborð vóru Ólavur Debes, Andreas Hilduberg, Kaj Johannessen, Johannes H. Pedersen, Rituvík, er nr. 3 f.v. í aftara rað, Ole J. Beck, Anton E. Pedersen, Runavík, nr. 5 frá høgru í aftara rað og Eyvind Gudmundsen, Runavík, nr. 4 f.h. í aftara rað. Hinir føroyingarnir vóru ikki til staðar, tá myndin varð tikin.*

Hendan januardag í 1957 minnast øll í Føroyum, sum vóru nóg gomul til tess. Eitt var, at trolarin var farin á Flesjarnar, men at tann ungi skiparin, sum hevði eina unga unnustu og var pápi at einum lítlum barni, skuldi farast, gjørdi hendingina serliga syrgiliga og minniliga.

Søgan um Góðanes byrjar annan jóladag í 1947, tá ið Góðanes kemur til Neskapustaður á Eysturlandinum. Íslendskaríkisstjórnin hevði skipað fyri endurnýgging av trolaraflotanum við at byggja trolarar í Bretlandi. Tveir trolarar komu til Neskaupstaðar. Annar var Góðanes, og hin var Egill Rauði, og hoyrdu teir báðir til sama reiðarí.

## Egill Rauði syrgiligan enda

Egill Rauði fekk ein syndarligan enda. Tað var í januar 1955, at hesin trolarin sigldi á land upp við Grønulíð á Vestfjarðunum í illveðri og kavaroki. Við vóru 34 mans, av hesum vóru 19 føroyingar. Hetta kundi lættliga gjørst ein tann størsti føroyski sorgarleikur, men takkað verið einum framúr íslendskum bjargingaravriki, eydnaðist at bjarga 29 av manningini. Fýra íslendingar fórust og ein føroyingur. Tað var tann 30 ára gamli Sofus Skoralíð úr Dali, sum doyði frá konu og barni.

Í samband við, at 50 ár vóru liðin síðan hesa vanlukku í 2005, hevði FF-blaðið eina frásøgn frá hendingini, sum fyrst og fremst var grundað á frásøgn frá Tórálvi Mohr Olsen av Sandi, sum var ein av manningini. Henda frásøgn kann lesast á heimasíðuni: www.fiskimannafelag.fo gamla heimasíðan, blað nr. 339

## Góðanes somu lagnu

Og nú minni enn tvey ár seinni fær Góðanes somu lagnu. Nýggársdag 1957 fer Góðanes frá bryggju í Neskaupstaði. Leiðin gekk til Føroyar, har ætlanin var at taka umborð 14 føroyingar, sum høvdu verið heima um høgtíðina. Teir náddu ikki til bryggju í Føroyum, og síðan hava størri skip og trolarar frá Neskaupstaði ikki loyst frá bryggju nýggjársdag. Egill Rauði fór nevniliga eisini sín seinasta túr nýggjársdag.

Góðanes hevði verið á ísfiskaveiðu fram til desember og lá um jólini. Hetta var tíðin, tá ið føroyingar fyri ein stóran part mannaðu íslendska trolaraflotan, og við Góðanes vóru 21 av 38 monnum føroyingar. 14 teirra vóru farnir heim við einum øðrum trolara at halda jól. Tann fasti skiparin var ikki við. Hann lat 1. stýrimannin, tann 23 ára gamla Pétur Hafsteinn Sigurðsson, fara sum skipara til Føroyar eftir føroysku manningini.

Góðanes fekk ringt veður til Føroya. Tá ið tað nærkaðist Føroyum fekk skiparin at vita, at tað var ikki kyrt at leggja at í Havn. Tí var ráðiligast at fara inn á Skálafjørðin og leggja at í Runavík.

Á Mjóvanesi møtti Góðanes íslendska trolaranum Austfirðingi, sum var á veg norðureftir. 1. stýrimaður á Góðanes fór niður undir at siga manningini, at nú fóru teir skjótt at leggja at. Skiparin saman við fleiri dekkarum var á brúnni, og radarin gekk. Skiparin var inni í kortrúminum og hugdi at radarskerminum. Hann hevði givið boð um, hvussu tað skuldi siglast, og kortini vístu, at siglingarleiðin var rein.

## Sigla á Flesjarnar

Klokkan nærkaðist níggju á kvøldi, tá ið trolarin var við at koma inn á Skálafjørðin, og siglt varð eftir vitanum í fjarðarmunnanum. Tá kemur kokkurin leypandi inn á brúnna og sigur land at vera beint fyri framman. Skiparin er í stundini á brúnni. Hann telegraferar til maskinrúmið. Fyrst gevur hann boð um at steðga maskinuni og beint eftir um at bakka.

Men áðrenn svarast kundi úr maskinrúminum, tók skipið botn. Fyrst tyktist tað sum at skipið streyk framvið einum skeri, og síðan tók tað harðliga og stóð fast. Sjálvt um bakkað varð við fullari megi, vikaðist skipið ikki. Hetta var lítið hugaligt í vetrarmykri og sjaskveðri.

Avrátt var at koma framat bjargingarbeltunum. Tað gekk eisini væl, og manningin lat seg í belti.

Gói, sum var ein av manningini, greiddi frá, at tá ið tað brast, varð hann blakaður fram úr koyggjuni og fekk ilt í fótin. Hetta vísti seg seinni at vera so mikið álvarsligt, at hann kom at ganga við stavi seinni.

## Aðru ferð skipari og fjarritari forlissa

Fjarritarin var Axel Óskarsson av Norðfirði. Hann var annar av teimum tveimum av manningini, sum eisini var við Egill Rauða, tá ið hann gekk burtur í 1955. Hin maðurin frá Egill Rauða var júst skiparin á Góðanes hendan túrin, Petur Hafsteinn. Hann hevði tá verið 2. stýrimaður á Egil Rauða, og hann var ein royndur sjómaður. Skiparin gav nú Axel boð um at senda neyðarkallið SOS. Tórshavn Radio váttaði beinan-



*Góðanes*